# Millum politikk og Poul F



**Fyrsta Trapputingið í samband við komandi fólkatingsval, startskotið til fólkatingsvalstríðið var í Miðlahúsinum fríggjakvøldi. Serligt fyri hetta Trapputing var, at tað var sent beinleiðis á Rás2.**

VALKJAK
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Við á Trapputinginum vóru nøkur av fremstu valevnunum úr øllum flokkum, Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldinum, Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum, Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum, Rúna Sivertsen úr Sjálvstýrisflokkinum og Bill Justinussen úr Miðflokkinum.

Áhoyrarnir í Miðlahúsinum og lurtarar á Rás2 fingu eitt livandi kvøld, har valevnini skiftu orð um føroysku umboðanina á fólkatingi, førda politikkin á fólkatingi síðstu árini, og hvat teir fara at brúka sína umboðan á fólkatingi til.

Hanus G. Johansen var gestatónleikari á Trapputinginum, og hann framførdi fleiri av sínum vælumtóktu vísum, umframt tónleik hjá Poul F.

Trapputingið var startskotið til fólkatingsvalstríðið, og aftur hesa vikuna er Trapputing í Miðlahúsinum. Fríggjadagin fara nøkur av fremstu valevnum til komandi fólkatingsval aftur at kjakast í Miðlahúsinum, kryddað við livandi tónleiki. Trapputingið komandi fríggjadag er millum klokkan 16 og 18. Tiltakið er alment, og har verður eisini høvi hjá áhoyrarunum at seta valevnunum spurningar.






**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya**

## Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya søkir avloysara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

Eitt fulltíðarstarv sum avloysari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi er leyst at søkja. Starvið verður sett 1. desember 2007 ella skjótast tilber og er til og við 30. juni 2008.

**Uppgávur:**
Á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum verður støðugt arbeitt við at menna útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing, sum er á bachelorstøði. Broytingar henda alsamt, og sum lærari á skúlanum fært tú møguleika at luttaka í og ávirka broytingarnar.

Høvuðsuppgávurnar hjá læraranum fevna um undirvísing innan sjúkrarøktarfakliga og heilsuvísindaliga fakøkið, at vegleiða lesandi og at tryggja teimum eina holla útbúgving.

**Førleikakrøv:**
Sjúkrarøktarfrøðingur við viðkomandi framhaldslestri á kandidat ella masterstøði.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til rektaran, telefon 35 22 55 ella 21 59 90.

Umsókn við CV og prógvum verður at senda til:

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya
Att.: Súsanna M. Mortensen, rektari
Jónas Broncks gøta 25
FO-100 Tórshavn

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo



## Handilslærlingur

**Vit sóknast eftir einum lærlingi til okkara HVS-handil.**

**Tín førleiki**
Vit vóna at tú ert fyrikomandi, íðin, nærlagdur, sjálvstøðugur og skilur týdningin av góðari kundarøkt. FHS ella onnur miðnámsútbúgving er ein fyrimunur.

**Afturfyri bjóða vit**
Eitt starv har ið tú saman við øðrum kemur at taka tær einum spennandi og fjøltáttaðum handli. Tú fært møguleika at hjálpa og leiðbeina kundum okkara, samstundis sum tú fært ábyrgd og møguleika til at menna okkara handil – Stutt sagt eitt spennandi starv í einari fyritøku í støðugari menning.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, mánadagin 10. desember.

Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkara á tel. 312 000

**Maria Poulsen pf**
**Postmoga 182**
**FO-110 Tórshavn**



**Maria Poulsen**